## Misfostur í Irak

Heilsumyndugleikarnir í irakska býnum Fallujah siga, at nógv børn har verða fødd við ymsum likamligum frávikum. Myndugleikarnir hava illgruna um, at hetta hevur samband við, at í einum álopi á býin fyri seks árum síðani brúkti amerikanski herurin hvítt fosfor og spreingiløðingar við urani. Ein irakskur lækni sigur við danska TV2, at læknarnir síggja tveir ella tríggjar tilburðir um dagin, og at myndugleikarnir nú ráða kvinnum í býnum frá at fáa sær børn. Amerikanska herleiðslan sigur, at hon tekur skuldsetingina í álvara, men at hon ikki er prógvað.



## Grikkaland lagt lamið

Um middagsleitið bleiv tað mesta av Grikkalandi lagt lamið, tá fakfeløgini skipaðu fyri aðalverkfalli fyri at mótmæla teimum búskaparligu tiltøkunum hjá stjórnini. Verkfallið rakti eitt nú alla stjórnarumsitingina og almennar stovnar, bankar, sjúkrahús og skúlar, og harafturat steðgaði at kalla øll samferðslan. Grikska stjórnin hevur samtykt at hækka skattin og at lækka lønina hjá almennum starvsfólki, samstundis sum meirvirðisgjald og tollur hækka. ES hevur róst stjórnini fyri tiltøkini, sum sambært ES eru alneyðug fyri at fáa búskapin aftur á beint.

# Tað lýsir í hjá línuflotanum

**Føroya Reiðarafelag staðfestir, at gongdin hjá línuflotanum hevur verið munandi betri higartil í ár enn somu tíð í fjør**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á síni heimasíðu vísir Føroya Reiðarafelag á, at árið 2009 var merkt av stórum trupulleikum við óvanliga vánaligum fiskiskapi og sera vánaligum fiskaprísum.

Í fjør høvdu feløgini, sum reka línuskipini, eisini ein annan stóran trupulleika, sum var at fáa skipini mannaði.

- Men við veksandi inntøku umborð og veksandi arbeiðsloysi á landi er tað nú lættari at manna skipini.

Heimasíðan veit at siga, at teir, sum reka línuskipini, síggja ljósari uppá framtíðina.

- Tað er soleiðis í fiskivinnuni, at bara ein góður túrur kann geva monnum mótið aftur, og nú sær veruliga út til, at fiskiskapurin er betri, og prísirnir eru á veg uppaftur.

### 17 kanska talið

Føroya Reiðarafelag vísir á, at tað vóru fleiri skip, sum ikki hóðraðu undan í 2009.

- Hetta ger, at skipini eru færri í tali nú. Hetta ger eisini, at betri pláss er at royna á hjá teimum, sum eftir eru. Hetta eigur so aftur at geva meiri til hvørt skipið.

Felagið sigur, at nú eru 17 línuskip til fiskiskap.

- Hetta meta línumenn at vera eitt hóskandi tal til skilagóðan rakstur á okkara grunnum. Tá vit byrjaðu hesa nýggju øldina, vóru tað eisini 17 línuskip. Tá skipini vóru flest í tali vóru tey 27.

Føroya Reiðarafelag heldur, at kanska er 17 skip hitt rætta talið av línuskipum.






*Føroya Reiðarafelag reisir nú spurningin, um ikki 17 línuskip er rættara talið heldur enn 27, sum tey vóru, tá skipini vóru flest í tali. Formaður í felagnum hjá reiðarum er Viberg Sørensen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hetta er besta fiskitíð, og tí er tað keðiligt at síggja, at miðalprísurin á fiskamarknaðinum er so lágur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sera lágur miðalprísur

**Góðar 9 krónur fyri kilo. Tað var miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt, tá Fiskamarknaður Føroya seldi góð 115 tons í gjár**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár 115,5 tons á uppboðssølu fyri eina góða miljón krónur.

Sløk 26 tons vóru av toski. Størstar vóru nøgdirnar av toski 3, sum fór fyri miðalprísin 12,95 krónur fyri kilo.

Tilsamans 35 tons vóru av hýsu, og her vóru nógv tær størstu nøgdirnar hýsa 2, sum fekk miðalprísin 8,04 krónur fyri kilo.

Hetta er framvegis sera lágur hýsuprísur fyri næst bestu hýsustøddina.

25 tons vóru av upsa, og flestu upsastøddirnar fóru fyri góðar 6 krónur í miðal fyri kilo.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini, sum vórðu seld á Fiskamarknaði Føroya í gjár, var lágur, góðar 9 krónur fyri kilo – ella neyvari 9,04.